# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Óluva Skaale, Tórshavn:

## Givin eftir næstan 40 árum í sama starvi

**Fríggjadagin 25. juni var seinasti skúladagur fyri summarfríðina á Sernámsdeplinum. Og sum vant varð skipað fyri hugnaløtu. Óluva Skaale, lærari, hevði sín seinasta arbeiðsdag á Sernámsdeplinum hendan dagin**



*Fríggjadagin 25. juli hevði Óluva Skaale, lærari á Sernámsdeplinum, sín seinasta arbeiðsdag*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Starvsfelagar, næmingar og foreldur vóru til hugnaløtuna, og talur vórðu hildnar av Hans Eli Dahl, stjóra á Sernámsdeplinum, og starvsfeløgunum Hera Tróndheim, Arnold Eiindsson, Jørmund Magnussen og Honnu Lisberg, fyrrverandi starvsfelaga.

Óluva byrjaði í 1966 á "Statens Skole for Tale- og Hørelidende", sum tá helt til á VBV á Skansavegnum í Havn. Tvey ár eftir at hon hevði tikið prógv á Føroya Læraraskúla í 1964.

Hon hevur arbeitt á stovninum øll árini, til hon nú fór frá seinasta fríggjadag.

Stjórin á Sernámsdeplinum, Hans Eli Dahl, segði m.a. "Tað er mær ein stórur heiður at vera tann, ið skal bera Óluvu Skaale eina serliga tøkk frá Sernámsdeplinum og mær sjálvum, nú hon leggur frá sær sum lærari. Eg havi ómetaliga stóra virðing fyri tær – fyrst sum menninskja við einum vælsignaðum sinnalagi og hjartalagi til lívsstarvið, ið tú valdi". "Fakliga hevur tú altíð kravt tað besta av tær sjálvari. Tú hevur bæði lønt og ólønt luttikið í øllum hugsandi skeiðum um so gott sum øll sernámsfrøðilig fyribrigdi til tess at menna førleikan at geva børnunum tað besta".

Hanna Lisberg, fyrrverandi starvsfelagi, segði m.a. "Óluva er ein sera nærlagdur lærari, sum dámdi sera væl at undirvísa og gjørdi alt, ið gerast kundi fyri næmingarnar, sum eisini vóru góðir við hana. Harafturat er hon ein sera góður samstarvsfelagi".

"Nógvir av næmingum hennara hava verið sera "tungir" við ymsum brekum. Óluva hevur hjálpt mongum av hesum næmingum, so teir klára seg væl".

Óluva er ættað úr Vági: Foreldrini vóru Frida, f. Mikkelsen, úr Vági, og Marius Absalonsen, ættaður av Viðareiði.

Hon arbeiddi sum ung á skrivstovu á Løghamri í Vági, og í 1960 tók hon studentsprógv.

Óluva hevur eisini staði á trolaradekki. Tá hon gekk á Føroya Læraraskúla, gjørdi hon eina uppgávu í landalæru um fiskiskap. Í hesum sambandi fór hon við trolaranum "Fiskanes" við Kaj Johannesnen sum skipara til fiskiskap undir Føroyum.

Meðan hon gekk á læraraskúla, arbeiddi hon á skrivstovuni á Føroya Saltsølu eftir skúlatíð, og eftir at hon hevði fingið lærararprógvið í 1964, arbeiddi hon fast á skrivstovuni til 1966, tá hon fekk starv sum lærari á Specialskúlanum.

Óluva er gift við Jóannes Skaale, úr Havn. Børnini hjá teimum eru: Magni, Sjúrður, Guttormur og Eydna.

Óluva og Jóannes eiga fimm ommu- og abbabørn.



*Óluva og maðurin, Jóannes Skaale*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Heri Tróndheim, starvsfelagi,heldur talu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tekniski Skúlin í Klaksvík:

## Prógvini handað SIT og HT næmingunum

Meðan ein luftsurfari sveimaði yvir Gravardali vóru prógvini handað SIT- og HT- næmingunum í dýrdarveðri úti í Grøv fríggjadagin 25. juni 2004.

Limir úr Klaksvíkar Hornorkestri og Rani Nolsøe við guitara ríkaðu løtuna við tónleiki.

Bergur Rasmussen, sum fyrr hevur undirvíst í føroyskum á HT-deildini, helt gestarøðuna eftir áheitan frá næmingunum.

Og vegna næmingarnar var tað Jim á Horni, sum helt eina bæði álvarsliga og skemtingarsama pisurøðu.6



***HT3-næmingar.*** *Aftara rað f.v.: Hallur Joensen, Klaksvík, Julius Biskupstø, Klaksvík, Ragnar Thomsen, Klaksvík, Rói Jacobsen, Jóannes Joensen, Klaksvík, Helgi Hvannastein, Haraldssund, og Ragnar Østerø Klaksvík*
*Fremra rað f.v. Davina á Lava Sundskarð, Klaksvík, Mogens Petersen, Klaksvík, Hjalmar Andreasen, Eiði, Dan Martin Johannesen, Norðtoftir, Gunnleivur Biskupstø, Klaksvík, Jim á Horni, Fuglafjørður, og Bjarta Reginsdóttir av Húsabrúgv, Argir*



***SIT-mæmingar,*** *f.v. Signar Højgaard, Klaksvík, Rógvi Nolsøe Hansen, Tórshavn, Poul Jacob Poulsen, Kunoy, Ranvá undir Kletti, Tórshavn, Sunleiv Christiansen, Leirvík, Eyðun Thorgeirsson, Klaksvík, Justinus Heini Hansen, Saltangará, Jóhan Mikkjalsson Joensen, Klaksvík, Niels Joensen, Fuglafjørð, Einar Petersen, Fuglafjørð, Oddur Mohr Jacobsen, Fuglafjørð, Eyðinn Jacobsen, Haraldssund, Leif á Lava Petersen, Klaksvík, og Jóhan Petur Jacobsen, Tvøroyri*

Fyri 30 árum síðan:

## Prógv á Føroya Læraraskúla í 1974



*Í 1974 tóku hesi prógv á Føroya Læraraskúla: Sigurd Bærentsen, Argir, Karin Petersen, Argir, Lisa Maria Djurhuus, Sandavágur, Jóhan Olsen, Sandavágur, Sofía Jacobsen, Leirvík, Elin Lambaa, Tórshavn, Sámal A Weihe, Tórshavn, Hanus Joensen, Tórshavn, Rasmus Joensen, Tórshavn, Anna Lützen, Tórshavn, Petur Simonsen, Tórshavn, Kristina Lützen, Klaksvík, Paulina Andreasen, Klaksvík, Karl Thomsen, Gøta, Gulak Jacobsen, Hvalba, Arne Jensen, Skúvoy, Sofus í Selvindi, Strendur, Jacob Thomsen, Sumba, og Jacobina Vang, Froðba*

*Kelda: Myndaárbókin, árið ið fór 1974*

### Dagurin

**2. juli. Syftunsøka.** Hildin til minnis um enska biskupin í Winchester Swinthun, sum doyði ár 862. 15. juli ár 971 varð hann skírdur halgimenni. Dómkirkjan í Stavanger í Norra er vígd honum. Minningardagur hansara er í Onglandi 15. juli, men í Føroyum og Norra er hann tann 2. juli, sum var deyðadagur hansara. Tað er tí helst úr Norra, at syftunsøkudagur er komin higar.

2. juli er eisini ein gomul **mariumessa**, vitjunardagur Mariu, til minnis um at Maria Moy vitjaði skyldkonu sína Elisabeth, móðir Doyparans.

*Niels Winther var føddur hendan dagin í 1822.*

### Brúleyp

Í dag, 2. juli, kl. 16.00 giftast í býráðssalinum í Havn Selma Ranghamar og Jóannes Kjølbro. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 3. juli kl. 9.30 giftast í Býráðssalinum í Havn Sirikit Hansen úr Leirvík og Eiler Jacobsen úr Havn. Brúdleypið verður á Hotel Føroyum fyri innbodnum.